# TRAPPUTING
UM EINLIGIR FORSYRGJARAR

í Miðlahúsinum mikukvøldið 21. apríl kl. 19:30

Fátækradømi rekur føroyskar barnafamiljur av landinum!

Miðlahúsið skipar fyri almennum kjakfundi um livikorini hjá einligum forsyrgjarum í Føroyum mikukvøldið 21. apríl kl. 19.30.

Á fundinum fara tær báðar **Siri Hansen** og **Annika Antoniussen**, sum báðar eru nýklaktar Cand. Pæd. Soc. at leggja fram spesialið, sum tær fingu topkaraktér fyri á Danmarks Pædagogiske Universitet herfyri.

Hetta er fyrsta kanning av sínum slag, har fíggjarligu og sosialu korini hjá einligum forsyrgjarum í Føroyum verða lýst.

Aftan á framløguna verður orðið frítt.

***Fundurin er almennur og ókeypis***

Orðstýrari verður Rigmor Dam

miðlahúsið
í Vágsbotni




# Hava ikki ráð til føðingardagar

**FÁTÆKT Einligir forsyrgjarar eru fátækir í Føroyum. Hetta hevur stórar sosialar avleiðingar, vísir nýggj kanning, sum verður løgd fram í Miðlahúsinum mikukvøldið**

Rigmor Dam

Stættastríðið er avgjørt ikki av, um tú spyrt ein einligan forsyrgjara í Føroyum. Hesin samfelagsbólkur hevur so vánalig fíggjarlig og sosial kor, at tað er nærum ógjørligt at yvirliva.

Tær stóru sosialu og sálarligu avleiðingarnar av fátækradøminum gera tað freistandi at pakka saman og at flyta av landinum.

Hetta vísir ein nýggj og slóðbrótandi kanning, sum er hin fyrsta av sínum slag um livikorini hjá einligum forsyrgjarum í Føroyum.

## Slóðbrótandi kanning

Kanningin er spesialið hjá teimum báðum, Siri Hansen og Anniku Antoniussen, sum luku kandidatútbúgving innan pedagogik og sosiologi á Danmarks Pædagogiske Universitet í 2009.

Í kanningini, har prátað verður við einligar forsyrgjarar um fíggjarlig og sosial kor, verður millum annað staðfest, at tað hevði verið ógjørligt at klárað seg, um tað ikki var fyri familjuna og annað netverk. Í samrøðunum fortelja einligu forsyrgjarnarnir um tiltøk og tilboð, sum tey mugu forsøma.

## Ikki ráð at liva

Her nøkur dømi úr samrøðum í spesialinum:

»... mín skal avstað nú. Tað kostar 10.000 kr. pluss lummapening.. tey skulu til London á hotelli í 8 dagar... og so sigur man, at fólkaskúlin er fyri øll.. tað er hann ikki, tá tú noyðist at rinda 10.000 kr...«

»ja, tey vilja hava tað sama, sum hini skúlabørnini... Ganga úti saman og sovorðið. Tá stendur illa til ... – jamen, so skulu tit ikki drekka so nógva mjólk hendan mánaðin og ikki hava so nógv rugbreyð.«

»Tað er hart, at noyðast at takka nei til føðingardagar, tí eg havi ikki ráð.«

»... eg droppaði at fara í konfirmatión í gjárkvøldið, tí eg havi simpulthen ikki ráð«.

»... tú noyðist at avbyrgja teg sosialt, tí tú hevur snøgt sagt ikki ráð til tað..«

## Meira í Miðlahúsinum

Úrslitini av kanningini verða løgd fram á almennum fundi í Miðlahúsinum mikukvøldið kl. 19.30.

*rigmor@sosialurin.fo*




**HYUNDAI SONATA 2.4** 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr:** MD 028 **Km:** 64.000
**Árgangur:** apríl 2006
**Útgjald:** 39.500 **Mðr. gjald:** 2.493 (5 ár)
**kr. 158.000,-**



**NISSAN PATROL 3.0** 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr:** JT 530 **Km:** 98.000
**Árgangur:** juli 2001
**Útgjald:** 60.000 **Mðr. gjald:** 3.516 (1,5 ár)
**kr. 115.000,-**



**TOYOTA COROLLA 1.4 D-4D LUNA** 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr:** RJ 190 **Km:** 55.000
**Árgangur:** nov. 2005
**Útgjald:** 33.750 **Mðr. gjald:** 2.133 (5 ár)
**kr. 135.000,-**



**TOYOTA HIACE 2.5 STUTTUR** 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr:** TB 516 **Km:** 30.000
**Árgangur:** des. 2006
**Útgjald:** 44.500 **Mðr. gjald:** 2.805 (5 ár)
**kr. 178.000,-**



**BMW 118 2.0** 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr:** SH 570 **Km:** 5.000
**Árgangur:** jan. 2009
**Útgjald:** 59.500 **Mðr. gjald:** 3.730 (5 ár)
**kr. 238.000,-**



**VW CADDY 1.9 TDI DIESEL** 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr:** ME 283 **Km:** 47.000
**Árgangur:** apríl 2007
**Útgjald:** 37.000 **Mðr. gjald:** 2.338 (5 ár)
**kr. 148.000,-**



**TOYOTA YARIS 1.3 LUNA M/M** 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr:** GB 420 **Km:** 36.000
**Árgangur:** august 2006
**Útgjald:** 34.000 **Mðr. gjald:** 2.125 (5 ár)
**kr. 136.000,-**



**TOYOTA YARIS 1.3 TERRA** 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr:** MA 614 **Km:** 73.000
**Árgangur:** mai 2006
**Útgjald:** 28.500 **Mðr. gjald:** 1.817 (5 ár)
**kr. 114 .000,-**



**TOYOTA COROLLA 1.6 TERRA** 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr:** RU 338 **Km:** 40.000
**Árgangur:** nov. 2006
**Útgjald:** 39.500 **Mðr. gjald:** 2.495 (5 ár)
**kr. 158.000,-**



**SUBARU FORRESTER 2.0** 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr:** VH 954 **Km:** 50.000
**Árgangur:** nov. 2006
**Útgjald:** 48.750 **Mðr. gjald:** 2.941 (5 ár)
**kr. 195.000,-**

6 mánaða garanti

**Vit bjóða 6 mánaða garanti uppá bilar, ið kosta meira enn 85.000,-**
Garanti skipan, ið hevur eina sjálvsábyrgd uppá kr. 500,-, fevnir um allar knappliga íkomnar feilir, ið eyðsæð ikki skyldast nýtslu brúkarans, rust, uttanífrákomnir skaðar ella væntandi tænastueftirlit.
Eingin gandur og eingir smáir bókstavir.
**Kom og vitja okkum – landsins fremstu bilasølu.**

Brúktir bilar við
**lagaligari fígging**

**REYNI SERVICE** P/F
Vegurin Langi · Hoyvík · Tel 353040 · Fax 353041
Við Borðoyavík · Klaksvík · Tel 473040 · Fax 473041
T-postur: rs@reyniservice.fo · www.reyniservice.fo